# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í landrásini

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um krabba í landrás

Um hesi sjúkueyðkenni ella niðanfyri nevndu viðurskifti verða funnin, skal ávísast til krabbameinsútgreining

Makroskopisk hæmaturi (uttan aðra upplagda orsøk)

Onnur uppløgd orsøk enn krabbi kann vera:
* AK-viðgerð í ov høgari dosering (Warfarin/DOAK)
* Dyrkanarváttað UVI fyri fyrstu ferð
* Hæmaturi eftir urinretentión

Mikroskopisk hæmaturi hjá vandabólkum

Vandabólkar: Roykjarar, maskinmeistarar, um arbeitt verður við evnafrøðiligum evnum, mekanikarar - t.d. flog-,bil-.

Sjúklingar >60 ár, har staðfest verður mikroskopisk hæmaturi saman við minst einum av fylgjandi

Pína kring bløðruna
Óró ella pína, tá vatnið verður latið
Pína undir síðuni (flankesmerter)
Palpabul ífylla

Um ábending er um krabba í landrásini frá CT ella øðrum radiologiskum kanningum skal eisini ávísast

## Kanningargongd

Fyrsta kanning, sum vanliga verður framd í urologiskum høpi, um illgruni er um krabba í landrásini, er ein CT-urografi við og uttan kontrast í trimum fasum. Hetta verður bílagt av krabbamóttøkuni ella urol.amb.
Ynskiligt er, at blóðroynd við kreatinin (eGFR) fyriliggur við ávísing. Og at stuttur ávísingartekstur undir aktuelt í ávísingar-skabelónini í Cosmic er so mikið greiður, at til ber hjá móttøkufólki ella urologi at bíleggja skanning ómakaleyst.

## Handfaring av residiv

Í uppfylgingartíðini: Ávísing til urologiskt ambulatorium
Eftir uppfylgingartíðina: Nýggj ávísing sendast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabbamein í landrás" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026